# HB mátti stríðast

**VODAFONEDEILDIN** HB vann við bit og slit á útivølli móti B71. Men allir sigrar geva trý stig í skjáttuna, og nú eru føroyameistararnir á oddasessinum

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| B71 | 0 |
| HB | 1 |

Tað var heldur ikki sannførandi hesaferð. Men HB er nú sannførandi á oddasessinum.

Kappingarárið hjá verandi føroyameistarunum hevur verið undarligt higartil. HB hevur framvegis ikki vunnið greitt á einum mótstøðuliði í hesum kappingarárinum, hóast høvuðsstaðarfelagið legði sjógv millum seg og grannarnar í oddastríðnum í gjár. Fimm stig skilja liðini, nú sjey landskappingardystir eru avgreiddir.

**Nú er liðið um at spæla upp til sítt besta, og eydnast venjaranum at fáa tað besta úr spælaranum, so er eingin ið fer at hótta føroyameistararnar**

## Heppið mál

HB hevur helst altíð havt eginleikar, sum hini liðini sjáldan hava. Liðið vinnur flestu dystirnar, hóast spælið ikki gongur serliga væl. Felagið er eyðkent fyri sín vinnaramentalitet, og HB er uttan iva greiðasta føroyska dømi um, hvussu langt tú kann røkka, um tú stríðist fyri tí.

Hendrik Rubeksen stóð fyri sigursmálinum hjá HB í gjár. Hann var fyrstur á bóltinum, sum brádliga stakk leysur inni í brotsteiginum, tí heimaliðið var ikki serliga ansið.

HB er tonnina framman fyri hini. Hendrik Rubeksen hevur seinastu árini válað aftur og fram millum fleiri feløg, og hann er nú aftur at síggja í troyggjuni hjá HB. Framherjin hevur higartil í hesum kappingarárinum staðið í skugganum av Andrew av Fløtum.

Í gjár var Rubeksen í byrjunaruppstillingini, og hann takkaði fyri álitið. Hann var innskiftur móti NSÍ fyri tveimum vikum síðan og javnaði, og nú byrjaði hann inni og stóð fyri sigursmálinum.

## Fer nakar at hótta?

Kavin hevur sjáldan darvað fyrireikingunum hjá føroysku fótbóltsliðunum sum í ár. Fleiri venjingar og venjingardystir eru avlýstir, og tað hevur sett sína greiða dám á fyrstu umførini.

Nú er liðini um at spæla upp til sítt besta. Við fyrstu sjey dystunum í huganum, kann HB vísa nógv meira. Spurningurin er tí, um Kristján Gudmundsson, venjari, fær tað besta úr einstaka leikarunum. Liðið hevur higartil verið lítil sannførandi, men vunnið eina rúgvu av stigum. Eydnast tað hjá venjaranum, so er tað eingin, sum fer at hótta verandi føroyameistararnar.



*Súni Olsen, sum her er líka við at økja fyri Víking, leikti ein góðan dyst sum spælfordeilari á miðjuni*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# Víkingur stýrdi

**VODAFONEDEILDIN** Burtursæð frá síðsta langa korterinum, tá B36 satsaði alt, var tað Víkingur, ið stýrdi gongdini í Gundadali í gjár. Sigurin hjá gøtumonnum og leirvíkingum var fult uppiborin, men Geza Turi átti lívið í teimum í yvirtíðini

Hilmar Jan Hansen

| | |
|---|---|
| B36 | 1 |
| Víkingur | 2 |

Byrjanin hjá B36 hetta kappingarárið er meinlík henni í fjør, tá árstalsfelagið í Havn streyk avstað fyrstu umførini, men síðani fullkomuliga steðgaði upp. Hóast hópurin í ár sær nógv sterkari út, er veikleikin akkurát tann sami: Ov lítið bit í har frammi.

Tað varð skorið út í papp í gjár, tá Víkingur vitjaði. Longu í øðrum minutti hjálpti sløsut verjuspæl teimum ljósabláu í gongd, tá Johan Ellingsgaard spældi Sam Jacobsen púra leysan, so hann lættliga kundi skora til 1-0. Ein sjokkbyrjan hjá vertunum og tilsvarandi dreymabyrjan hjá gestunum.

Annars hevði Víkingur fult tamarhald á øllum fyrstu trý korterini. Ta einu ferðina fekk Christian R. Mouritsen tveitt seg fram og skallað bóltin í fangið á Geza Turi, men annars var einki – púrt einki!

Víkingur vann fyrst og fremst spælið á miðvøllinum, og tær ferðirnar farið varð í álop, gekk tað skjótt fyri seg, men uttan at stórvegis møguleikar tó spurdust burturúr. B36 hevði bóltin nógv, men skapti einki, og tí nýttist heldur ikki teimum í Víkingi at spíla seg meira út enn neyðugt.

## Dysturin livnaði

Eftir steðgin var tað uppaftur meira Víkingur, ið setti seg á dystin. B36 smokkaði bara meira og meira, meðan Víkingur søkti at og skapti kjansir, ið kundu havt avgjørt dystin, áðrenn tað nakrantíð bleiv spennandi.

Eitt gott korter var farið, tá gestirnir fingu eitt bíligt brotsspark, ið Súni Olsen trygt setti í netið, men næstu 10 minuttirnar kundi Víkingur havt økt til bæði 3-0 og 4-0. Ein av yngru spælarunum, Kaj Leo í Bartalsstovu, kom til góða skotstøðu, og tað sama gjørdi Súni, tá hann fekk beina kós ímóti málinum, men ikki avsluttaði nóg væl, so Meinhardt Joensen í B36-málinum kundi sláa bóltin út til hornaspark.

So hendi brádliga tað, ið gav dystinum lív og andadrátt. Eftir eitt hornaspark fekk Meinhardt fatur á bóltinum og sendi hann fram í vinstru síðu, har Bárður J. Hansen á bakkinum royndi at toyggja seg, men ikki rakk. Í staðin rann Hjalgrím Elttør avstað og sendi so innfyri til innskifta Heina Eysturoy, ið mitt fyri málinum var ósvikaliga tryggur og minkaði um munin.

## Ov seint hjá B36

Nú var eitt korter eftir, og langt um leingi tóktist B36-liðið hava skilt, at her mátti arbeiðast meira fyri sakini. Tað skuldi bara vísa seg at vera ov seint, og fleiri mál fullu ikki.

Eitt sindur av roki stóðst av fleiri støðum, og serliga í tí eina førinum vóru tvey hermót í senn, har menn løgu og ilt var at taka dagar ímillum, hvør hevði gjørt hvat. Skammiligt, tí einki av tí hevði nakað við fótbólt at gera. Hvørki dómari ella linjudómari sóu, hvat hendi, og tí fekk einki av hesum heldur avleiðingar.

B36 tveitti alsamt meira fólk fram og trýsti av øllum alvi. Eitt nú var serbiski miðverjin, Dmitrije Jankovic, líka við ta einu ferðina, men Geza Turi bjargaði meistarliga, umframt at hann meiri enn ta einu ferðina syrgdi fyri, at B36 ikki fekk bóltin í málið og tí heldur einki stig fekk.

Tað hevði B36 neyvan heldur uppiborið, tí í 75 minuttir var liðið steindeytt og vísti einki. Fleiri heftu seg við, at B36 skuldi havt fingið eitt brotsspark, men tað kom ikki, og eftir stóð, at Víkingur hevði nógv meira yvirskot og størri evni at skapa nakað. Tí var tað fult uppiborið, at gestirnir fóru avstað við øllum trimum stigunum.

hilmarjan@sosialurin.fo